# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð
# Bygdarráðsfundur tann 15. desember 2009, kl. $18^{00}$

**Bygdarráðslimir á fundi:** Karl A. Olsen, Herit Magnussen, Jóhan Simonsen, Jón Mikkelsen, Evelyn Gaard, Bárður Poulsen og Siri S. Niclassen
**Skrivari:** Maud Poulsen

---

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

Vísandi til grein 18, stk. 2, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri hevur Pauli T. Petersen boðað frá, at henni berst frá møta á fundinum, og at tiltakslimur fær fundarboð í hansara stað.

Tiltakslimurin Sóleyð Poulsen fekk fundarboð munnligt tann 20. oktober 2009.
14. desember 2009 gav hon avboð vegna sjúku. Næsti tiltakslimur Jóhan Simonsen fekk fundarboð munnligt tann 14. desember 2009.

Sambært grein 18, stk. 3, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, skal kommunustýrið gera av, um treytirnar fyri innkalling av tiltakslimi eru loknar.

Bygdarráðið samtykti einmælt at góðkenna innkallingina av Jóhan Simonsen sum tiltakslimi.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 61**
Áseting av almennum fundardøgum fyri 2010.
J. nr. 2009-003

Skotið verður upp, at almennu fundardagarnir verða niðanfyri nevndu dagar:

| | | |
|---|---|---|
| 26. januar | 23. februar | 23. mars |
| 27. apríl | 18. mai | 22. juni |
| 31. august | 28. september | 26. oktober |
| 9. november | 23. november | 14. desember |

**Viðv. 61**
Uppskotið einmælt samtykt.

# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð
# Bygdarráðsfundur tann 15. desember 2009, kl. $18^{00}$

**Bygdarráðslimir á fundi:** Karl A. Olsen, Herit Magnussen, Jóhan Simonsen, Jón Mikkelsen, Evelyn Gaard, Bárður Poulsen og Siri S. Niclassen
**Skrivari:** Maud Poulsen

---

Herit Magnussen farin av fundinum vegna ógegni.

**Mál 62**
Sundurbýti. Umsókn frá Dávur Kristian Magnussen um, at 1 gyllin Heimi í Haga á Bjørgum, matr. nr. 362, verður frábýtt til samanleggingar við matr. nr. 280a.
J.nr. 2009-230

**Viðv. 62**
Tilmælið einmælt samtykt.

Herit Magnussen komin aftur á fund.

**Mál 63**
Setan av arbeiðsfólki.
Tilmæli frá Teknisku nevnd um møguliga setan av arbeiðsfólki ella handverkara.
J.nr. 2009-231

**Viðv. 63**
Herit Magnussen legði fram broytingaruppskot um at beina málið aftur í nevnd, tí at málið er ikki nóg væl lýst.

Broytingaruppskotið hjá Herit Magnussen einmælt samtykt.

**Mál 64**
3. viðgerð av uppskoti til fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2010.
J.nr. 2009-176

**Viðv. 64**
Tilmælið samtykt við 6 atkvøðum fyri, og 1 blankari atkvøðu.
Karl A. Olsen, Herit Magnussen, Jón Mikkelsen, Evelyn Gaard, Bárður Poulsen og Siri S. Niclassen atkvøddu fyri.
Jóhan Simonsen atkvøddi blankt.

**Mál 65**
Røktarheimsbygging

**Viðv. 65**
Bygdarráðið varð kunnað um gongdina í málinum.

Bókin lisin. Fundur lokin kl. 19.45.

Sign.:

Karl A. Olsen Herit Magnussen Jóhan Simonsen Jón Mikkelsen

Evelyn Gaard Siri S. Niclassen Bárður Poulsen